LM-104/2020

fylgiskjal 2

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7j
Tórshavn

25 januar 2021

Viðvíkjandi.: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiði v.m.

Bóndafelag Føroya takkar fyri møguleikan at gera viðmerkingar til hetta uppskot.
Vit vilja boða frá at vit taka undir við uppskotinum.
Vit vilja tó mæla til at uppskotið verður broytt soleiðis at "Grágás" verður broytt til "Villgás"

Tað er soleiðis, at fleiri sløg av gás eru í Føroyum, og gera tær allar skaða, serliga er tað "Brandgás" (inræsið slag) sum er farin at gera nógv um seg, og kemur hon við nógvum ungum á hvørjum ári.
Hetta var ikki ein trupuleiki fyri 10 árum síðan, men er nú so nógv til av hesum slagi, at hon gerð stóran skaða.

Í viðmerkingunum stendur at "ikki er loyvt at skjóta grágás meðan hon bølir á eggum og hevur ungar", helst fyri at verja búðfuglin, fyri at tryggja, at stovnurin endurnýggjar seg, tað er skilligt.
Men sera umráðandi er tað, at loyvt er at skjóta alt vári, summari og út á heysti, tí tað er tá at gásin ger mest skaða, minnast skal til, at bert er loyvt at skjóta í veltum lendi, og at endamálið er at styggja gásina vekk frá hesum lendi.
Her er tó ikki vandi fyri gásini sum reirast, tí hon fer burtur frá bøi og í hagan fyri at goyma reiður sítt, og fjalir seg fyri tað mesta har til ungin er floygdur.

Eftur er so ungfuglurin, sum ikki reirast fyrr enn hann er 2-4 ára gamal, hesin fuglur liggur troður á bøin, fær hann frið, líka til fyrst í juli, tá allur fuglurin skiftur fjarðar og legst við vøtn, fjøru og strendur.
Um Ólavsøkuleitið flúgva gæsnar aftur og leggjast í bøin, um tær fáa frið, bara í størri tali, tí tá er búðfuglurin og allir hansara flogbúgvnu ungar við.

Fyri at taka saman um.
Broyt grágás til villgás.
Og loyvi at skjóta villgás alt ári, á tí sera avmarkaða velta lendinum vit hava.
Vit koma fegin at greiða gjøllari frá um neyðugt.

Vegna Bóndafelag Føroya
Sigert Patursson
Formaður